# Jógvan Sofus farin

Tað kom dátt við at frætta, at Jógvan Sofus Ferjá var deyður hósdagin í farnu viku. Hóast 94 ára gamal var hann framvegis byrgur, og vit vóru mong sum gleddu okkum at vera saman við Jógvani Sofus og Dinnufíu, nú tey skuldu halda jarnbrúdleyp tann 3. desember.

Soleiðis skuldi ikki gangast. Men tey fingu tó eitt sera langt lív saman. Áðrenn tey giftust vóru tey forlovað í 5 ár, so tey hildið saman uttan himpr í ikki færri enn 75 ár. Tað er í hvussu er nakað, sum er vert at minnast.

Tann, sum er komin nakað til Gjáar, er eisini komin at kenna Jógvan Sofus. Hann var sjónligur í bygdini og tosaði við øll. Hann var fyrikomandi og vinarligur, og hann visti altíð so ótrúliga nógv. Men hann duldi tó ongantíð fyri, at Dinnafía visti enn meira, og tað var eisini rætt. Men hon var kortini ikki so sjónlig sum hann.

Men tann sum kom inn á gólvið hjá teimum fekk skjótt sannað hetta. Tey bæði umboðaðu gamla bygdamentan uppá tað besta.



Vit vóru einaferð nøkur, sum vóru ein sunnudag við Gjógv og fóru í kirkju. Hesi løgdu til merkis hetta hábarðsliga gamla parið, sum til skriftarmálið bukkaði seg eina ferð framman fyri altarið og til altargondina tríggjar ferðir. Hetta er gamal kirkjusiður og føldist hátíðarligt hjá teimum, sum yngri vóru.

Lesararnir á Sosialinum kenna Jógvan Sofus og Dinnufíu frá teirri røð, sum var í Miðvikuni fyrr í ár. Tí er ikki neyðugt at skriva meira um teirra lív á hesum sinni. Her var talan um søguskriving av allarbesta slag, har tey bæði stuðlaðu hvørjum øðrum í at fáa mest møguligt fram av tí, sum tey mintust. Eins hugnaligt, sum tað var at vitja tey heima við Gjógv var tað at sita saman við teimum á Mørkini í Streymnesi, har tað varð greitt frá teirra 3/4 øld saman og eisini tíðini undan tí. Jú, hetta vóru fólk, sum høvdu verið við til at leggja lunnar undir tí samfelagi, sum vit hava í dag.

Úrslitið gjørdist ein einastandandi frásøgn, sum varð nógv lisin og væl umtókt. Serliga kensluborin var frásøgnin um Acorn, sum tað annars ikki hevur verið tosað ella skrivað um, men sum nógv, eisini avvarðandi, vóru takksom um, tá ið hon kom fram.

Tey bæði hava havt ein stóran vinarskara. Hetta sást í kapellinum, tá ið Jógvan Sofus varð borin út, og har bygdarmaðurin bispur talaði. Hetta sást ikki minni á jarðarferðini týsdagin, tá ið Emil Olsen talaði. Her varð Jógvan Sofus væl lýstur, sum tann vala- og fróðarmaður, hann var. Dinnafía var heldur ikki gloymd fyri hennara leiklut í teirra langa lívi saman.

Tað hevur verið stuttligt at kenna tey bæði, og tað var stuttligt at kenna Jógvan Sofus. Hann er ikki ein vit koma at gloyma.

**ó.**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Petur Petersen,** fyrrverandi prestur, búsitandi í Tórshavn, andaðist mikudagin, 83 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskappelinum fríggjdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Petur kunnu lata Vistarheiminum á Fugloyarvegi eina gávu. Konta í Eik banka.

**Dagurin**

**24. november. Chrysogonos**, deyður umleið ár 300. Halgisøgurnar siga, at hann var kristin einbúgvi, sum varð tikin av døgum meðan Diocletianus var keisari.

**25. november. Katrin**, deyð umleið ár 300. Halgisøgurnar greiða frá eini vakrari og klókari prinsessu í Aleksandriu, sum mangir hábornir menn bóðu um, líka keisarin. Men hon vildi ongum játtast, tí at Kristus var hennara sanni brúðgómur

**26. november. Konrad**, deyður ár 975. Týskur fúrstasonur, sum seinni bæði gjørdist dómpróstur og biskupur. Hann læt byggja bæði kirkjur og sjúkrahús og kleystur. Varð skýrdur halgimenni í 1123.






# Jóannes Skaale 70

Í gjár, 22 november, verður Jóannes Skaale sjeyti ár. Jóannes er sonur fyrrverandi borgarstjóran í Havn, Sigfried Skaale og bóndadóttrina av Trøllanesi, Jóhannu Matheu Skaale, fødd Joensen.

Jóannes var føddur í Havn, men fór til Mikladals at vera, tá hann var hálvtfjórða ára gamal. Kríggið herjaði, og trongligt var í húsunum í Kaldbak, har tey tá búðu. Tá Jóhanna Mathea gjørdist við barn fyri aðru ferð, var Jóannes sendur norð til mostur sína Jónu, nevnd Jónna, og mann hennara Marius Johannesen, sum var ættaður úr Funningi, og sum tá var lærari í Kallsoynni.

Jóannes vaks upp sum einasta barn hjá Jónnu og Mariusi, og roknar seg helst meiri sum mikladalsmann enn sum havnarmann.

Hann varð verandi í Mikladali inntil hann –sum flestu dreingir haðani norðan- blaðungur fór til Klaksvíkar at rógva út.

Tá hann var 15 ára gamal kom hann aftur til Havnar at ganga á VBV. Men hugurin til sjógvin var stórur, og eftir lokið preliminerprógv, var Jóannes til skips við ymsum skipum.

Í 1960 fór hann á læraraskúla, har hann hitti Óluvu Absalonsen úr Vági, sum hann giftist við í 1964. Tey giftust inn til Marius og Jónnu, sum tá vóru á háskúlanum í Havn. Og í 1965, tá Óluva og Jóannes bygdu hús í Grønulíð, fluttu Marius og Jónna við, og búðu restina av teirra lívið í kjallaraíbúðini har.

Jóannes fór, eftir lokna læraraútbúgving í 1964, beinleiðis niðan í Hoydalar at starvast. Har var hann inntil skipanin var broytt, og realdeildin var niðurløgd. Tá fór hann upp á skúla á sjómansskúlanum í Havn. Ætlanin var at fara til sjós, tí havi dró. Men mongum brestir ætlan, og tá útbúgvingin var liðug, var Jóannes biðin at vera verandi á sjómansskúlanum og undirvísa. Stórur tørvur var á monnum, ið bæði høvdu nautiska- og læraraútbúgving. Hann játtaði við teirri treyt, at hann kundi fáa orlov av og á og fara til sjós. Fleiri ferðir gjørdi hann sær dælt av hesum, og var burtur í eitt ár hvørjafeð.



Jóannes var verandi á Sjómansskúlanum inntil 1998, tá heilsan fór at bila.

Men hóast hann ikki orkaði at undirvísa longur, hevur hann tó trúliga røkt sítt deknastarv við Havnar Kirkju í 14 ár. Harumframt hevur hann verið virkin sum skrivari í ymsum feløgum og nevndum, m.a. í Útróðrarfelagnum.

Hann kanska serliga alment kendur í Føroyum fyri at hava týtt og lisið bøkurnar "Nám Sálomon Kongs" og "Hornblower" í útvarpinum. Føroyska málið hevur hansara stóra áhuga, og á sinni hevði hann ein málteig í sjónvarpinum, umframt at hann fleiri ferðir hevur luttikið við pallborðsfundum um mál.

Størsti áhugi hansara er tó glasfipurbáturin Espingur, sum næstan má roknast sum ein partur av Jóannesi sjálvum. Nógvir tímar eru nýttir í bátinum og í egningarskúrinum -bæði til útróður og til stuttleikatúrar við børnum og abbabørnum.

Jóannes og Òluva eiga fýra børn. Magni føddur í 1965, Sjúrður føddur í 1967, Guttormur føddur í 1970 og Eydna fødd í 1981. Abbabørnini eru átta í tali, umframt at eitt er á veg.

Vit ynskja Jóannesi hjartaliga tillukku við degnum.